

*Hans Eiler Hammer, sóknarprestur við Klaksvíkar býi í baksýninum á norðoyastevnu: -Ein oyðileggjandi og drepandi setningur fyri okkara medmenniskju og samfelag okkara sum heild verður mangan havdur á lofti millum manna: "Eg havi hoyrt í býnum í dag"*

## *Tú mást ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum!*

# Slaturin er eitt drepandi eitur

**-Hetta er eitt drepandi eitur, ið drepur samfelag okkara, kirkjur og samkomur okkara. Ja, vit drepa hvønn annan sálarliga við følskum vitnisburðum um næsta okkara, við lygnum, við øvundsjúku, við sleygi og slatri. Og aloftast er tað sum vit bera í bý falskir vitnisburðar segði ein sera opinskáraður klaksvíksprestur, Hans Eiler Hammer í prædikuni á Hvítusunnu, sum vit prenta í heilum líki**

*Lagt til rættis og myndir: Jan Müller*

**Sálmar til 6.s.e.páskir: 241, 353, 106, 232 | 522, 78**
**1. Tekstarøð (Klaksvík 2003 – útvarpsg.)**

### Prædika til 6.s.e.páskir

**Bøn:** *"Kannað meg, Guð, og kenn mítt hjarta, rannsaka meg og kenn mína hugsan! Vita um eg gangið á glatunarvegi, og leið meg hin æviga vegin!"*

**Hetta heilaga evangeliið til 6.s.e.páskir skrivar Jóhannes Evangelistur í tí 15. kapitli, ørindini 26 og út, og í 16 kap. ørindini 1-4 og tað ljóðar so í Jesu navni.**

**Heilgi Faðir! Vit takka tær fyri títt heilaga orð til okkara í dag. Orð títt er sannleiki, læt tað vísa okkum vegin til sannleika og til sælu. Amen.**

*Tú mást ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum!* Soleiðis ljóðar 8. boð, givið okkum av Guði til tað besta fyri okkum menniskju og næsta okkara. Hvat er tað so vit eiga at læra av hesum boði?

Luther svarar og sigur: Tað er at "Vit eiga at óttast og elska Guð, so at vit ikki ljúgva uppá næsta okkara, ikki svíkja hann, baktala hann ella spilla hann út; men vit eiga at umbera hann, tala gott um hann og taka alt væl upp og leggja tað besta í alt."

Við hesum boði, vil Guð hava okkum at skilja hvussu týdningarmikið tað er at verða upptikin av sær sjálvum, ístaðin fyri øllum øðrum. Tí okkum tørvar ongan frelsra, fyrr enn vit týðiliga síggja okkara egnu syndir. Tí annars verða tað bert hini, sum hava frelsu fyri neyðini.

Ein oyðileggjandi og drepandi setningur fyri okkara medmenniskju og samfelag okkara sum heild, verður mangan havdur á lofti millum manna: **"Eg havi hoyrt í býnum í dag!"** Og í kjalarvørinum av hesum setningi kemur so ein frásøgn, um hvat tað er ein nú hevur hoyrt í býnum. Og tað er ikki at koma uttanum, at ofta er tað, sum ein hevur hoyrt, nakað negativt um ein annan persón, ella persónar. Og so er ein fúsur til at bera hetta víðari til aftur ein persón, sum eisini ferð víðari við tí, og soleiðis byrjar slaturin, sum so mangan fýkur um oyruni á okkum. Hetta er oyðileggjandi og drepandi fyri okkum sjálvi, og fyri okkara medmenniskju. Og eg havi ikki valgt at byrja við hesum í dag, tí at eg haldi meg verða nakað betri enn nakran annan. Men eg havi valgt at steðga á við hetta tí at eg má erliga viðurkenna, at tað mangan nívir meg at hoyra slaturin, sum fýkur so hjartaleyst um oyrini á okkum, um allar atfinningarnar, sum vit nýta um næsta okkara. Og grípa vit í egnan barm, mugu vit mangan viðurkenna: Ja, vit eru fús til at taka lut í tí sjálvi.

Og tað, sum verri er, er at hetta hevur spreitt seg langt inn í kirkju okkara, inn í samkomur okkara. Har ein skuldi trúð at friður og kærleiki til hvønn annan valdaði, har valdar mangan ófriður og oyðilegging. Tí kann ein av røttum mangan verða ivasamur, tá ið trúgvandi menniskju sita saman. Tað er sum um ein er fúsur til at tosa um hvønn annan, ístaðin fyri við hvønn annan. Og mangan verður tað undirstrikað, at tað ein ber í bý veit ein frá álítandi keldum ella við 100% vissu, og tá alt kemur til alt, so hevur tað hóast alt einki hald í veruleikanum.

Hetta er eitt drepandi eitur, ið drepur samfelag okkara, kirkjur og samkomur okkara. Ja, vit drepa hvønn annan sálarliga við følskum vitnisburðum um næsta okkara, við lygnum, við øvundsjúku, við sleygi og slatri. Og aloftast er tað sum vit bera í bý falskir vitnisburðar.

Tí er tað at eg eisini altið sigi við konfirmantarnar í undirvísingini um 8.boð, og sum eg eisini vil áminna hvønn einstakan av okkum um í dag, at í tí løtu vit blíva freistaði at tosa um onnur fólk, eiga vit at spyrja okkum sjálvi:

- Er tað sum eg sigi sannleiki?
- Er tað sum eg sigi neyðugt at siga?
- Er tað sum eg sigi til skaða fyri onnur, fyri mín næsta?

Kunnu vit svara "JA" uppá hesar spurningar eiga vit at tiga, og á tann hátt fyribyrgja at enn ein falskur vitnisburður fer út millum manna.





*Hákun Dam, deknur, Hans Eiler Hammer, sóknarprestur og Niels Juul Arge, klokkari*

Kæra kirkjulið, og kæra menniskja, ið situr heima og lurtar og kæru Norðoyastevnu gestir. Jesus ynskir at sannleikans andi skal liva í okkara hjørtum. Tann andin, ið er ginign út frá Faðirinum sjálvum. Tí eiga vit, sum trúgva á sannleikans anda og sum siga okkum at hava sannleikans anda í okkum, at ganga ímóti streyminum.

Tað verður mangan sagt, at vit trúgvandi eiga at verða ein opin Bíblia fyri næsta okkara. Um hetta er ein veruleiki, ja so er tað ikki so undarligt, at vit hava so mangar ymiskar áskoðanir uppá Bíbliu okkara, tí lið um lið í kirkju okkara liva trúgvandi, hyklarar og vanligir syndarar.

Nei skulu vit finna sannleikan og fáa lut í sannleikanum, so mugu vit fyrst av øllum lata Jesus siga okkum sannleikan um okkum sjálvi.

Tí kann tað mangan bæði verða gott og neyðugt at grípa í egnan barm og rannsaka seg sjálvan, og tað er nakað sum Bíblia okkara støðugt áminnir okkum um at gera.

*Eisini tit skulu vitna,* sigur Jesus. Ja, hvat fyri vitnisburður er tað vit bera víðari. Er tað ein vitnisburður, ið dýrmetir Jesu navn? Ella er tað ein vitnisburður, ið skaðar næsta okkara? Eitt sætt vitni, er eitt vitni, ið hevur sæð við egnum eygum ella uppliva við sær sjálvum. Kvinnurnar, sum páskamorgun komu til ta tómu grøvina, og sum møttu tí upprisna Jesusi, tær kundu vitna um tað, sum tær sjálvar høvdu sæð og upplivað. Lærusveinarnir, trúðu ikki kvinnunum fyri vitnisburð teirra. Nei, teir trúðu ikki fyrr enn teir sjálvir høvdu sæð og upplivað hin upprisna Jesus Kristus.

Paulus, ið bleiv steðgaður á vegnum til Damaskus, bleiv ein av kirkjunnar fremstu vitnum, tí at hann kundi vitna um tað, sum hann sjálvur sá og upplivdi, tá Jesus vísti seg fyri honum.

Soleiðis kundu vit hildið áfram og víst á tey sonnu vitnini. Men í dag verða so hesi orðini søgd til okkara. *"Eisini tit skulu vitna!"* Vit eru ikki komin saman her í kirkju okkara fyri at minnast ein stóran persón frá fortíðini. Nei, vit eru her fyri at uppliva og síggja hin upprisna Jesus Kristus. Hann er her veruliga tilstaðar, í orði sínum. Hann vil nýta okkum sum síni vitni, soleiðis at sannleikans boðskapur kann koma víðari til onnur menniskju.

Vit hoyrdu lisið frá altarinum úr fyrra Pæturs brævi: *"Um einhvør talar, tá tali hann sum Guðs orð!"* Ja, vitnisburður okkara her í kirkjum og samkomum okkara eigur altíð at roynast á Guðs heilaga orð. Er tað sannleikans vitnisburður? Hetta er eisini galdandi fyri tann vitnisburð vit bera víðari frá persóni til persón. Tað er ikki mín persónliga meining, ella slatur og sleyg, ið eg skal bera víðari í vitnisburði mínum, men bert tað sum kemur frá Guði. Tað er bert tað sum eg sjálvur havi upplivað og sæð ígjøgnum sannleikans anda, ið eg eigi at bera víðari til mín næsta, soleiðis at eisini hann ella hon kann koma til trúgv á hin upprisna Jesus Kristus.

Lærusveinarnir hjá Jesusi blíva settir til eina megnar uppgávu, at vitna um alt tað, sum teir hava upplivað og sæð saman við Jesusi. Men hesa uppgávu skulu teir ikki standa einsamallir í. Teir skulu bíða eftir gávu Heilaga Andans, ið skal styrkja og leiða teir í tænastuni. Hesa gávu fáa teir hin fyrsta Hvítusunnudag og hitt fyrsta hvítusunnuundurið, hvar 3000 menn og kvinnur koma til trúgv á hin upprisna Jesus Kristus, kann ei skiljast uttan gerning Heilaga Andans.

Tí standa vit í dag eisini yvir fyri hesi somu megnar uppgávu. Heldur ikki vit eru einsamøll. Vit hava gávu Heilaga Andans okkara millum, ið skal styrkja og leiða okkum í tænastu okkara.

Sannleikans andi fær okkum altíð at bera sannleikans vitnisburð fram. Sannleikans Andi kann á ongum sinni signa okkara mongu følsku vitnisburðar.

Tí standa vit ikki yvir fyri eini lættari uppgávu, tað fingu Jesu fyrstu lærusveinar eisini at uppliva. Men eru vit trúgv í hesi uppgávu, vilja vit at enda sigra, sjálvt um vit kunnu uppliva , sigur Jesus, at blíva koyrd út úr samkomuhúsinum.

Latum okkum tí biðja um, at eisini vit mugu verða Sannleikans vitnir í hesum syndiga heimi. Latum okkum tí biðja um, at Guðs Andi má fylla hjarta, sál og sinn okkara, soleiðis at Kristus má koma at týða so nógv fyri okkum, at vit ikki kunnu annað, enn at vitna um hann – í orði og í verki.

Amen.

**Latum okkum øll biðja.**

Lov og tøkk og allur heiður veri tær, Guði várum, faðir, syni og heilagum anda, sum altíð hevur verið, er og altíð verður ein sannur tríeinigur Guð, hálovaður frá fyrsta upphavi og um allar ævir.

Vit biðja teg, himmalski faðir okkara, um at tú má verða hjá okkum øllum við náði og hjálp tíni. Verð hjá øllum teimum, sum hava tað ringt og eru stødd í neyð, veit tú teimum hjálp frá tær. Troysta øll tey, ið syrgja, ja síggj í kærleika til faðirleys og móðurleys, einkjur og einkjumenn og ver hjálpin hjá øllum teimum, sum ongan góðan eiga.

Vit biðja fyri børnunum og teimum ungu. Halt tú tey á lívsins rættu og góðu gøtum. Harri, styðja og styrk tey gomlu gev tú teimum í friði og náðum at leggja frá sær, tá teirra tími kemur. Hjálp so okkum øllum, soleiðis at vit verða varðveitt í trúnni á teg. Leið tú okkum við tíni náðigu hond eftir lívsins vegi, so at vit at enda mega fáa ein gleðiliga uppreisn!

Vælsigna tú, faðir, fólk títt um allan heimin, og í fólki okkara. Vælsigna og varðveit kirkjufólkið her í Klaksvík, og allar teir lurtarar, ið sita runt Føroya Land í hesi løtu. Hjálp okkum øllum at goyma orð títt í hjørtum okkara.

Halt tína sterku hond yvir sjófólki okkara, varðveit tú teir og før teir aftur í øllum góðum.

Vegleið tú teir, sum tú hevur sett til at stýra og ráða, eisini her heima á landi. Her hugsa vit serliga um løgting og landsstýrið og kirkjunnar leiðslu, bæði biskop og próst. Og vælsigna og varðveit eisini allar orðsins tænarar.

Vælsigna og varðveit drotning okkara, og alt hús hennara.

Fylg okkum so á øllum leiðum okkara, og hjálp okkum til altíð at fylgjast við tær. Tað biðja vit teg um í Jesu navni. Amen!

**Latum okkum so við apostlunum ynskja hvør øðrum:**

*At Harrans Jesu Krists náði og kærleiki Guðs og samfelag heilaga andans má vera við okkum øllum!*

